MENTAMÁLARÁÐIÐ

Ársætlan fyri lærugrein

Lærarin, sum undirvísir í lærugreinini, ger ársætlan, sum verður latin leiðslu skúlans fyri 15. sept.

Skúlaár	2019/20
Skúli	Skúlin við Streymin
Floksheiti	
Floksstig	6. flokkur
Lærugrein	Støddfrøði
Lærari	Marita Reinert Mohr

Ársætlan fyri lærugrein	**Lærugreinaøkið hetta skúlaárið** Geometri Grundleggjandi roknihættirnir Stór tøl Prosent Rúmd Krossskipan Brot Heil tøl Tíð og ferð Tabell Lummaroknari

Heiti 1	Geometri: Toppunkt- umfarsvinkul og miðvinkul Skilja og duga at brúka vinkulmátara. Rokna vídd á kvadrat, rektangul og tríkantum. Rokna ummál á kvadrat, rektangul og sirklli. Læra π(pi)- radius og tvørmát. Arbeiða við π kommatal og sum brot Spegla, flyta og snara
Heiti 2	Grundleggjandi roknihættirnir: At skilja at býta og falda eru mótsettir roknihættir Býta og falda við heilum tølum og kommatølum Skilja at pluss og minus eru mótsettir roknihættir Plussa og minusa við heilum og kommatølum

MENTAMÁLARÁÐIÐ

Heiti 3	Stór tøl: Vita hvat eitt potenstal er og deila tað sundur í rót og stigvísara Skilja eitt potenstal. Vita at rótin skal faldast við sær sjálvum líka so ofta, sum stigvísarin sigur. Duga at gera stór tøl til potenstøl, serliga í tíggjutalsskipanini.
Heiti 4	Prosent: Læra at prosent merkir av 100 - 1 av 100 er 1% Duga at halda skil á % skal leggjast afturat ella um % skal trekkjast frá.
Heiti 5	Rúmd: Duga at rokna rúmd av kassum (l x b x h) og sylindara ($R=r^2 \cdot \pi \cdot h$) Skilja lit sum rúmd.
Heiti 6	Krossskipan: Finna punkt til eina linju, við at brúka sildabein t.d. l: (x,6 - x) og læra at skriva forskriftina til eina linju soleiðis: y=6-x Duga at flyta eitt skap í eini krossskipan og uppgeva nýggju punktini. Kenna x og y ásan (x,y) Duga at spegla um ásarnar x og y
Heiti 7	Brot: Duga at leggja brot við sama nevnara saman. Duga at draga brot við sama nevnara frá. Duga at gera eitt brot til eitt blandað tel. T.d. 7/4=1 ¾ Duga at gera brot til kommatøl. Duga at rokna einfaldar tekstuppgávur við brotum. Duga at leingja og stytta brot Duga at rokna ein brotpart av einum tali
Heiti 8	Heil tøl: Kenna tallinjuna (positiv tøl, null, negativ tøl) (óendaligt) Kenna teljutøl (1, 2, 3, 4, ...) Kenna heil tøl (.....-3, -2, -1, 0, 1, 2, 3, 4, ...) Kenna kvadrattøl ($6^2 = 6 \times 6$) Kenna rúmtøl ($6^3 = 6 \times 6 \times 6$)

MENTAMÁLARÁÐIÐ

Heiti 9	Tíð og ferð: Kenna eindirnar samdøgur, tímar, minuttir, sekund og duga at rokna við teimum. Duga at brúka eina ferðaætlan. Duga at rokna ferð.
Heiti 10	Tabell: Næmingarnir skulu duga lítlu tabell uttanat. Hetta arbeiði er partur av allari undirvísingargongdini.
Heiti 11	Lummaroknari: Næmingarnir skulu kenna knøttirnar: kvadratrót, potensur, brot, minnisknappin
Tilfar og arbeiðsmátar	**Tilfar:** Grundbókin er Rokning 5a, Skygni 6 og annað tilfar sum har til hoyrir. Eisini verður brúkt annað tilfar, sum styðjar undir tað, sum skal lærast. So um annað tøkt tilfar og heimagjørt tilfar, emat.dk, matematikbogen.dk , **Arbeiðshættir:** Undirvísingin skiftir millum felags upplegg, vikuskema, einstæklinga uppgávur og bólkauppgávur. Næmingarnir fáa heimaarbeiði, og er tað í trá við undirvísingargongdina. Næmingarnir fáa heimaarbeiði fyri. Tað verður "vanligt heimaarbeiði, innlatingar og teldutøkar uppgávur. **Eftirmeting:** So hvørt sum undirvíst verður innan ymisku økini, verður eftirmett, og blívur tilfar gjørt, so tað passar til einstaka næmingin. 6. fl. skal til landsroynd í vár.

MENTAMÁLARÁÐIÐ

Ársætlan fyri lærugrein

Lærarin, sum undirvísir í lærugreinini, ger ársætlan, sum verður latin leiðslu skúlans fyri 15. sept.

Skúlaár	2019/20
Skúli	Skúlin við Streymin
Floksheiti	
Floksstig	6. flokkur
Lærugrein	Náttúra og tøkni
Lærari	Marita Reinert Mohr

Ársætlan fyri lærugrein	Fyri at røkka endamálinum í námsætlan fólkaskúlans viðvíkjandi lærugreinini fara vit fyrst og fremst at fylgja bókini Náttúra og tøkni 3 hjá Sólgerð Andreassen og Óla Petersen, Sólgerð Andreasen stendur aftanfyri arbeiðsbókina har royndir og uppgávur, sum hoyra til bókina eru í og lærarabókina. Haraftrat brúka vit alnótina og ymiskar uppslagsbøkur umframt tað at fara út í náttúruna at gera royndir. Vit koma neyvan í dýpdina við øllum evnunum, men ætlanin er, at næmingarnir fáa nortið við øll evnini og fáa eina hilling av, hvat tað er, vit tosa um. Lærugreinin hevur 2 tímar um vikuna. Ætlanin er at brúka 1 tíma til tann teoretiska partin og 1 tímar til tann praktiska partin, har vit gera royndir, sum stuðla undir tann teoretiska partin.

Yvirlit yvir undirvísingar-gongdir	Evnini vit fara at arbeiða við í ár eru: Jarðfrødi • Føroya • Jørðin • Eldgos • Jarðskjálvti • Tsunami Síl og laksur • Áir • Laksur í føroysku áum

MENTAMÁLARÁÐIÐ

- Dálking
- Laksaaling

Fjøran

- Lendi
- Lív og gróður í fjøruni (tari og skeljadjór)

Rúmdin og jørðin

- Atdráttarmegin
- Hitin á jørðini
- Jørðin
- Vindur
- Flóð og fjøra

Havið

- Aldur og brim
- Havstreymar
- Plantuæti
- Djóraæti
- Havbotnurin
- Lívið í sjónum
- Fiskirannsóknarstovan s.66
- Fiskivinna

Súgdjór

- Hvat er eitt súgdjór (djóraflokkar)
- Hvalur - grindahvalur

Gróðður

- Ringrásin
- Plantur - trø og runnar
- Endurnýtsla
- Náttúrulundin við streymin

Fuglar

- Bygnaður
- Støðufuglar, strokfuglar, flytifuglar

MENTAMÁLARÁÐIÐ

	• Dálking • Ringmerkingar • Havhestur Eisini fara vit at arbeiða við øðrum evnum, sum ikki eru planløgd, men stinga seg upp og eru gevandi fyri lærugreinina. Vit eftirmeta, so hvørt hvørt evnið er gjøgnumgingið.

Mentamálaráðið umsitur undirvísingar-, granskingar-, menta- og kirkjumál
Mentamálaráðið • Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
(+298) 35 50 50 • (+298) 35 50 55 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

Ársætlan fyri lærugreinina

Lærari: Anita S.T.Simonsen	Flokkur: 6.	Skúlaár: 2019-20
Lærugrein: Føroyskt		
Tímar: 6		

Lærugreinaøki hetta skúlaárið:
* Lesing
* Stavseting
* Mállæra
* Skriving
* Framburður

Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:
a) Lesing:
- Vit lesa ymisk tekstasløg, fyri at tann einstaki næmingurin í størri mun gerst áhugaður í at lesa.
b) Stavseting:
- At tey flestu orðini verða stavaði rætt, og at næmingurin gerst tilvitaður um, nær "ð" skulu setast í bundin navnorð/sagnorð, og onnur "ð"-orð.
c) Mállæra:
- Orðaflokkarnir verða neyvari viðgjørdir, og arbeitt verður miðvíst við at læra bendingarmynstur
d) Skriving:
- At næmingurin lærir at skriva bæði eftir forskriftum og frítt. At hann lærir at seta tekin í setningarnar, og at býta setningar upp.
e) Framburður:
- At næmingurin lærir at bera tað føroyska málið fram í flokssamrøðum men eisini í sjálvstøðugum framløgum.

Harafturat arbeiða vit miðvíst við uppgávum, søgum o.ø., sum víðka um ta etisku og geografisku vitanina hjá næminginum.Ynskiligt er, at næmingurin lærir, hvussu onnur við aðrari áskoðan og mentan hugsa, og víst verður í hesum sambandi á, hvar tey búgva. Hetta fyri at næmingurin gerst betri førur fyri at møta einum fjølbroyttum heimi.

Arbeiðsháttur:
a) Lesing
* Lesa heima og í skúla
* Frílestur
* Framhaldssøgur lisnar fyri næmingunum
* Lesiskeið
b) Stavseting:
* Fyrisagnir, spøl, skrivibøkur, "talvu-undirvísing" o.a., har dentur verður lagdur á tær størstu avbjóðingarnar, sum eru í flokkinum.
c) Mállæra:
* Skrivihefti, talvu-undirvísing, fáa mállæru fyri heima o.a. verður nýtt fyri at læra mállæru.

Tilfar og amboð:
* Ævintýr: skaldskapur av manna munni og listævintýr
* Tættirr: Niklas hjá Pena, Í dans
* Kvæði: Kópakonan
* Sangir: "Herbergið", "Eg hoyri ongastaðni heima", "Kalli Katt" við Kára P, "Kenna tit Rasmus" við Jógvan Hansen á íslendskum, "Himnan i min famn" við Carolu Haggkvist á svenskum og "Lítla Marin"
* Yrkingar: Og heyst kom við kulda, Stella Argos og Deyði Svabos
* Sanna gøtubarn
* Dreymar búgva allastaðni
* Isabel, gøtubarn í Rio

* Veingjaða myrkrið * Kom við, lesi- og skrivibók * Brennivargurin * Krabbabøkur * Teldan * Kom og skriva * Eg skrivi	
Nær verður eftirmett og hvussu: * Eftirmetingar verða gjørdar gjøgnum árið. Hvussu lærir næmingurin best? Og hvat er neyðugt at læra.* Avbjóðingarnar í flokkinum eru stórar. Tann fakliga spjaðingin er ovurstór og tað sama kann sigast um arbeiðslagið, so at hesum má eg taka hædd fyri.	
Latin inn: Sep.19-20	Undirskrift lærarans: Anita S.T.Simonsen

Ársætlan fyri lærugreinina

Lærari: Anita S.T.Simonsen	Flokkur: 6.	Skúlaár: 2019-20
Lærugrein: Enskt		
Tímar: 4		

Lærugreinaøki hetta skúlaárið:
-Lesing

-Skriving

-Málburður

-Mállæra

- Mentan

Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:
Dentur verður lagdur á, at næmingarnir lesa flótandi og duga at greiða frá innihaldinum í einum teksti. Hetta eigur í størstan mun at verða gjørt á enskum. Týdningarmikið er, at næmingurin skilir tað, sum hann lesur. Hetta verður eftirkannað og - mett við m.a. at spyrja inn til tekst og orð. Fyri at stimbra hesa menning brúka vit bæði floksbók, men eisini í stóran mun frílestur.

Í skriving er málið, at næmingarnir læra at skriva ymsar fríar og bundnar uppgávur og at stava tey mest vanligu orðini.

Evni og uppgávur, sum vit arbeiða við, verða m.a. vald fyri at styrkja um orðfeingið hjá næminginum á enskum, men samstundis verður havt í huga, hvørji áhugamál næmingar í hesum aldri hava. Pit Stop til 6.flokk viðger áhugaverd evni fyri málbólkin, og tær tilhoyrandi uppgávurnar í uppgávuheftinum eru sera fjølbroyttar.
Vit noyðast tó at supplera nakað við mállæru og mentanini í ymiskum enskttalandi londum, av tí at Pit Stop ikki ger so nógv við hetta.

Viðvíkjandi mállæru skulu næmingarnir helst læra ta mest viðkomandi mállæruna fyri at duga at orða seg rætt á enskum. Orðaflokkar sum navnorð, sagnorð og lýsingarorð verða gjøgnumgingnir; innan navnorð verður dentur lagdur á at skilja millum eintal og fleirtal, bundið og óbundið. Viðvíkjandi sagnorðum vera tey regluligur og nøkur av teimum mest vanligu óregluligu sagnorðunum gjøgnumgingin. Innan lýsingarorð verður tosað um ta stigvisu bendingina á enskum.

Mentan: at næmingarnir læra eitt sindur um mentanina í Stóra Bretlandi, USA, Australia og India. Vit fara í dýpdina við onkrum evni í einum av londunum, nema leysliga við mentanina og søguna í hinum londunum, og vit taka vanligar siðvenjur og livireglar ígjøgnum í fleiri av londunum.

Arbeiðsháttur:
Næmingarnir fáa fyri at lesa heima og lesa í skúlanum - í bólkum, fyri hinum, einsæris o.s.fr. Eisini fara næmingarnir at greiða frá hvør sínum teksti fyri øllum í flokkinum. Vit tosa um glosur, innihald og úttalu. Eisini verður tosað um tekstin, har høvi hjá næmingunum er at svara spurningum og/ella gera spurningar. Harafturat eru uppgávuhefti, har næmingurin fær høvi at loysa ymsar uppgávur, sum eru í tráð við tekstin. Aðrar uppgávur verða eisini gjørdar; bæði munnligar og skrivligar. Pit Stop er soleiðis uppbygt, at nógvir ymiskir arbeiðshættir verða nýttir; so sum at loysa ymsar orðagátur, at klippa, tekna, skriva og at lurta eftir teksti við tilhoyrandi uppgávum.

Frílestur lesa vit í skúlanum og heima.

Fyri at venja mállæru og vanliga stavseting, nýta vit uppgávur úr Pit Stop og úr heftum.

Í tímunum verður so vítt gjørligt tosað enskt. Dentur verður lagdur á, at øll sleppa at royna seg.

Tilfar og amboð:
- Pit Stop 6, lesi- og arbeiðsbók.

- Frílesingsbøkur

- Let's Do It, Break

- Orðabøkur

- Strok: Krossorðagátur

- Filmar: Bend It Like Beckham, Alice in Wonderland og Robin Hood

- Sangir: Puff the Magic Dragon, Never Gonna Give You Up, Girls Just Wanna Have Fun og Last Christmas

- Fløguspælarin/ samvirkna talvan verður nýttur fyri at hoyra tekstin lisnan, men eisini fyri at lurta eftir ókendum teksti við tilhoyrandi spurningum.

Nær verður eftirmett og hvussu:
Eftirmetingar og mannagongdir verða eftirmettar av og á. Næmingarnir hava ávirkan á, hvørjar uppgávur vit loysa, og hvussu nógva tíð vit nýta til hvønn kapitul í bókini sær, alt eftir áhuga og endamáli.

Latin inn: Sept. '19	Undirskrift lærarans: Anita S.T.Simonsen

MENTAMÁLARÁÐIÐ

Ársætlan fyri lærugrein

Lærarin, sum undirvísir í lærugreinini, ger ársætlan, sum verður latin leiðslu skúlans fyri 15. sept.

Skúlaár	2019/20
Skúli	Skúlin við Streymin
Floksheiti	
Floksstig	6. flokkur
Lærugrein	Søga
Lærari	Marita Reinert Mohr

Ársætlan fyri lærugrein	Fyri at røkka endamálinum í námsætlan fólkaskúlans viðvíkjandi lærugreinini fara vit fyrst og fremst at fylgja bókini Søga okkara 2, sum Christian Høj hevur skrivað og við dagføringum av Jens Chr. Carlsson og Jørgin M. Árnason við Úlvsá. Haraftrat brúka vit alnótina og ymiskar uppslagsbøkur. Vit koma neyvan í dýpdina við øllum evnunum, men ætlanin er, at næmingarnir fáa nortið við øll evnini og fáa eina hilling av, hvussu okkarar samfelag er broytt, seinastu 500 árini. Lærugreinin hevur 1 tímar um vikuna.

Yvirlit yvir undirvísingar-gongdir	Vit fara at arbeiða við evnunum niðanfyri, hettar fyri, at næmingarnir skulu skilja tídningin av søgu. Dagurin í dag, er søga í morgin. Evnini vit fara at arbeiða við eru: • Søga, sagnir og gerandisdagur í Føroyum fram til uml. 1800 • Politikkur, vinnulív og fakfeløg í Føroyum og Europa fram til 1900 • Fyrri heimsbardagi, tíðin millum heimsbardagarnar og seinni heimsbardagi. • 14 sep. 1946 og fyrstu árini undir heimastýri. • Frá vælferð til kreppu 1970- 1999 • Skúlaskapur • Ítróttarsøga • Trúarlív • Føroyska mentanin

MENTAMÁLARÁÐIÐ

	Vit eftirmeta, so hvørt evnið er gjøgnumgingið.

Ársætlan fyri lærugreinina

Lærari: Anita Simonsen	Flokkur: 6.flokkur	Skúlaár: 2017-18
Lærugrein: Kristni		
Tímar: 1		

Lærugreinaøki hetta skúlaárið:

* Bíbliusøgur: Vit taka nakrar av teimumum stóru søgunum í Bíbliuni igjøgnum, bæði í Gamla Testamenti og í Nýggja Testamenti.
* Onnur evni: Bygnaður av Bíbliuni, Jødadómur, kirkjusøgan, Luther, katolisisman, Afrika/Suður Amerika, kristin myndlist, Jesu líknilsi, Jesu undur og høgtíðirnar
* Etikur: Hvat er rætt og skeivt og moralur: hvussu verður rætt og skeivt útint í tí veruliga lívinum.
* Sálmar: Er Jesus nær, Mary, did you know?, Himlen i min famn, Gakk tú fram við góðum treyst
* Sangir: Kim Hansen - Knút og Meistarin, Lív Hansen - Eitt annað land, Hillsongs, Newsboys - God's Not Dead

Harafturat viðgera vit evni sum: ábyrgd, atburður, gott/ilt, gleði, sorg, kærleiki, sjálvsvirði og vinalag.

Nomið verður nakað við aðrar lívsáskoðanir, bæði fyri at fáa eina vitan um hesi viðurskifti, men eisini fyri at víðka um sjónarringin hjá tí einstaka næminginum, t.d. jødadómin, katolisismu og islam.

Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:
* At næmingurin fær eina vitan um ta kristnu trúnna og aðrar lívsáskoðanir, men eisini
* At næmingurin fær eina fatan av, at lívið liva vit ikki einsamøll, men vit liva í einum felagsskapi, har vit hava samábyrgd. Vit hava stóran týdning sum einstaklingar, og í felagsskapinum hava vit samábyrgd at fáa lívið hjá okkum sjálvum og øðrum at fungera.

Arbeiðsháttur:
* Greiða frá
* Spurnarkappingar
* Loysa uppgávur
* Sangur
* Prát
* Bólkaarbeiði

Tilfar og amboð:
* Kristni 6, næminga- og uppgávubók
* Talgild rød um ferðslu o.a. á Snar.fo
* Bíblian
* Lunchpad, Sue Clutterham
* Teldan og alnótin

Nær verður eftirmett og hvussu:	
Eftirmett verður ígjøgnum árið, hvat næmingurin hevur lært, og hvussu áhugin var fyri evnum og undirvísingarhættum. Av tí at tímatalið í ár einans er 1 tími um vikuna, verður ikki so nógv gjøgnumgingið í kristni, sum ynskiligt er.	
Latin inn: Sep.2019	Undirskrift lærarans: Anita S.T.Simonsen

MENTAMÁLARÁÐIÐ

Ársætlan fyri lærugrein

Skúlaár	2019-2020
Skúli	Skúlin við Streymin
Floksheiti	A
Floksstig	6
Lærugrein	Danskt
Lærari	Durita Djurhuus

Ársætlan fyri lærugrein	*Heildarætlan fyri undirvísingina viðvíkjandi námsætlan, tilfari og arbeiðsháttum, sum dentur verður lagdur á hetta skúlaári.* **Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøki.** **Stuttsøgur**: Her verður arbeitt við ymsum donskum stuttsøgum. Endamálið við hesum er at læra næmingarnar at lesa á donskum og at finna temu í søgum. Stórur dentur verður lagdur á at lesa og greina stuttsøgurnar, og er ætlanin eisini at arbeiða við tulking, persónslýsingum, forteljara og sjónarhorni. **Danskar yrkisbókmentir**: Her verður arbeitt við at lesa og skilja smáar danskar yrkistekstir, Her er eisini ætlanin at fáa næmingarnar at kjakast um og skilja donsk virðir. Hetta verður ma. gjørt við at lesa ymisk tekstasløg frá ymsum tíðarskeiðum. **Ævintýr, greinar** og myndir: Her verður arbeitt við hesum trimum tekstasløgum, har dentur verður lagdur á at læra, hvat eyðkennir tekstasløgini. Ætlanin er eisini at arbeiða við myndum i hesum økinum og koma verður eisini inn á skifti og klimaks í søgum. **Lesing, skriving og mállæra**. Umframt omanfyrinevndu lærugreinaøkini er eisini ætlanin at gera nógv við lesing, skriving og mállæru. Lesingin fer í stóran mun fram í sambandi við lærugreinaøkini, meðan skrivingin í ein mun eisini fer fram í hesum økjum. Harafturat er ætlanin at skriva fyrisagnir regluliga, og næmingarnir fara at skriva søgur ella annað heima gjøgnum árið

Yvirlit yvir undirvísingar-gongdir	*Ráðlagdar undirvísingargongdir* **Arbeiðsháttir.** Undirvísingin verður skipað í bólkum, pørum, einsæris og sum felagsundirvísing í flokkinum. Allir formar fyri undirvísing verða nýttir í øllum økjum, og arbeiðshátturin verður tann, ið hóskar seg best til sjálva undirvísingina.

MENTAMÁLARÁÐIÐ

	Tilfarð: Tilfar, ið nýtt verður: D'dansk + arbeiðsbók, diktathefti, frílesingbøkur, heimagjørt tilfar, sangir, Ljósrit av tekstum, www.snar.fo , Mállæruuppgávur, Aðrar uppgávur. Vit lesa eina skaldsøgu.
Heiti 1	Hvad tænker du på?
Heiti 2	Så håret rejer sig
Heiti 3	Læs romaner
Heiti 4	Stof til eftertanke
Heiti 5	Det minder mig om
Heiti 6	I det blå
Heiti 7	Hvad tænker du nu?
Heiti 8	I fattigdommens dage
Heiti 9	Eventyr
Heiti 10	Grammatik

MENTAMÁLARÁÐIÐ

Ársætlan fyri svimjing

Er latin leiðslu skúlans fyri 15. sept.

Skúlaár	2019/2020
Skúli	Skúlin við Streymin
Floksheiti	
Floksstig	6. flokkur
Lærugrein	Svimjing
Lærari	Thordis Dahl Hansen

Ársætlan fyri lærugrein	**Svimjing** Kjarnuøkið svimjing fevnir um førleikarnar at svimja, at styrkja evnini hjá næminginum at svimja. Eisini fevnir hetta kjarnuøkið um kunning um viðurskifti í sambandi við venjing og í sambandi við vandar, ið eru knýttir at svimjing, eitt nú um grundleggjandi bjargingarhættir og fyrstuhjálp. Høg ryggsvimjing Lág ryggsvimjing Crawl Bringusvimjing Kava Venda - saltovending Duga at svimja høga ryggsvimjing Duga crawl – 300 m uttan at steðga Duga at kava í hylin fyri síðani at svimja longdir Duga bringusvimjing – 300 m uttan at steðga Klára saltovending eftir bringusvimjing og crawl Klára at svimja í 30 minuttir uttan at halda pausir – sjálvvaldan svimjihátt Umframt at svimja skulu næminarnir eisini duga ella kenna bjargingar/ sjálvbjargingarhættir og vita, hvussu teir kunnu hjálpa, um vanlukka hendir, uttan at seta seg sjálvan í vanda. Eisini skulu næmingarnir duga bjarging av troyttum svimjara.

MENTAMÁLARÁÐIÐ

Ársætlan fyri lærugrein

Lærarin, sum undirvísir í lærugreinini, ger ársætlan, sum verður latin leiðslu skúlans fyri 15. sept.

Skúlaár	2019/20
Skúli	Skúlin við Streymin
Floksheiti	6
Floksstig	6. flokkur
Lærugrein	Ítróttur
Lærari	Andreas Lava Olsen

Ársætlan fyri lærugrein	Heildarætlan fyri undirvísingina viðvíkjandi námsætlan, tilfari og arbeiðsháttum, sum dentur verður lagdur á hetta skúlaárið Arbeitt verður eftir námsætlanini fyri ítrótt, ætlanin er at fáa allar næmingar at vera virknar í spæli og rørslum, dentur verður lagdur á, at øll skulu kunna vera við og at geva næmingunum innlit í týdningin av at røra seg. Roynt verður at hava fjølbroytta undirvísing, so næmingarnir fáa innlit í nógvar ymiskar hættir at vera aktivur uppá.

Evnir	Kjarnaøkini sum vit koma at arbeiða við: • Bóltspøl • Fimleikur • Rørsla og tónleikur • Útilív • Frælsur Ítrottur

MENTAMÁLARÁÐIÐ

Ársætlan fyri lærugrein

Lærarin, sum undirvísir í lærugreinini, ger ársætlan, sum verður latin leiðslu skúlans fyri 15. sept.

Skúlaár	2019/2020
Skúli	Skúlin við Streymin
Floksheiti	4-6. flokkur
Floksstig	4-6. flokkur
Lærugrein	Smíð
Lærari	Andreas Lava Olsen

Ársætlan fyri lærugrein	Ársætlanin er, at varðveita og menna áhuga og skapandi evnini hjá næminginum. At geva næminginum møguleika at ogna sær ymiskar tilevningar- og arbeiðshættir, so hann verður førur fyri at handfara amboð og tilfar á tryggan og fullgóðan hátt. At menna ansin fyri útsjónd, sniði soleiðis at næmingurin lærir at virðismeta týdningin á tilevnaðum lutum. At geva næminginum møguleikan at ogna sær kunnleika um fjølbroytt tilfar og møguleikar at skapa og evna burturúr hesum tilfari.

Undirvísgongdir	Undirvísingargongdirnar koma at taka støði í teimum 3 kjarnaøkinum:
Kjarnaøki	Tað eru 3 ymisk kjarnaøki sum arbeitt verður við. Økini umskarast og virka fyri stóran part saman í undirvísingini. • Sniðgeving og verk • Handaligu arbeiðsøkini • Samfelagsligt og mentanarligt innihald

MENTAMÁLARÁÐIÐ

Ársætlan fyri lærugrein

Lærarin, sum undirvísir í lærugreinini, ger ársætlan, sum verður latin leiðslu skúlans fyri 15. sept.

Skúlaár	2019-2020
Skúli	Skúlin við Streymin
Floksheiti	A
Floksstig	4 – 6. flokkur
Lærugrein	Miðlar
Lærari	Anni Joensen

Ársætlan fyri lærugrein	Heildarætlan fyri undirvísingina viðvíkjandi námsætlan, tilfari og arbeiðsháttum, sum dentur verður lagdur á hetta skúlaárið undirvísingin verður eftirmett regluliga. Skift verður ímillum ymiskar arbeiðshættir, so sum bólkaarbeiði, kunning og vegleiðing í at nýta Office365 og tilhoyrandi amboð, framløgur, film og myndaviðgerð Tilfar: Teldur, Office365, PowerPointh, Ipad , og annað tilfar av alnótini, so sum filmar, myndir og tekstur.

Yvirlit yvir undirvísingargongdir	
Heiti 1	
Heiti 2	
Heiti 3	
Heiti 4	
Heiti	

MENTAMÁLARÁÐIÐ

Ársætlan fyri hondarbeið.

thordis.dahl.hansen@skulin.fo

Skúlaár	2019/2020
Skúli	Skúlin við Streymin
Floksstig	4. til 6. flokk
Lærugrein	Hondarbeið
Lærari	Thordis Dahl Hansen

Ársætlan fyri lærugrein	Handarbeið er partur av lærugreinini handaverk og list og hava næmingarnir handarbeiði 4 tímar um vikuna í áleið 8 vikur. 4. flokkur er einsamallur í einum bólki Næmingarnir í 5. og 6. flokki eru blandaðir og eru í tri. Hondarbeið er ikki í august, desember og juli. Eitt av endamálinum við lærugreini er at næmingarnir uppliva gleðina av at skapa og at næmningarnir fáa kensluna av at teir duga at skapa. Næmingarnir skulu eisini sleppa at hugsavna seg. Næmingarnir í 4. flokki koma fyri tað mesta at brodera og um tíð er til tað, so koma teir eisini at tøva. Næmingarnir í 5. og 6. flokki eru sjálvir við til at avgera hvat teir vilja gera, tó skulu allir læra at tráða eina seymumaskinu og at seyma beinan seym. Holdini gera eisini lutir, sum passa til tíðina t.d. jólaprýði til jóla og páskaprýði til páskirnar.

MENTAMÁLARÁÐIÐ

Ársætlan fyri heimkunnleika

Skúlaár	2019-2020
Skúli	Skúlin við Streymin
Floksheiti	Handaverk og list í miðdeild
Floksstig	4.-6. flokkur
Lærugrein	Heimkunnleiki
Lærari	June-Eyð Joensen
Tímatal	4 tímar um vikuna í 8 vikur pr. hold

Ársætlan fyri lærugrein

Ársætlanin er gjørd í samsvar við námsætlanina fyri heimkunnleika (sí namsaetlanir.fo), Tó má havast í huga, at heimkunnleiki av røttum er kravd lærugrein í 6. flokki við trimum tímum um vikuna, men hjá okkum eru tímarnir býttir yvir trý skúlaár frá 4.-6. flokk (4 tímar um vikuna í 8 vikur pr. hold hvørt skúlaár), og tí má undirvísingin lagast eftir næmingunum á ymsu holdunum.

Í námsætlanini eru støðisførleikarnir at virða, at samskifta, at kanna og at skapa í mun til lærugreinina lýstir og fakligu førleikamálini ásett, hvat næmingarnir skulu duga eftir 8.-9. flokk.

Undirvísingin verður skipað við undirvísingargongdum innan tey 5 kjarnaøkini:

- Matur, lívsgóðska og mentan
- Matur og ráðlegging
- Matur og umhvørvi
- Matur og brúkari
- Matur og reinføri

Fakligir førleikar - 8.-9. floksstig

Matur, lívsgóðska og mentan

Næmingurin dugir:

- at leggja til rættis, gera og meta um eina máltíð frá hugskoti →matgerð →borðreiðing.
- at meta um ymiskan smakk og seta hann í samband við kryddarí, matvøru, tilgerðarhátt, máltíðir, borðreiðing, huglag og rúm.
- at hagreiða og matgera heilsugóðan mat og duga at greiða frá føðsluvirðinum í matinum.
- at varðveita og menna føroyska matmentan.
- at seta saman máltíðir og gera matskráir við íblástri frá skiftandi árstíðum, ymiskum tíðarskeiðum og ymiskum mentanum.
- at meta um um kosturin er í samsvar við tær heilsutilráðingar, ið eru frammi í

MENTAMÁLARÁÐIÐ

tíðini.
- at greina týdningin matur og máltíðir hava fyri heilsu og lívsgóðsku.
- at brúka KT til at meta um orku- og føðsluvirði í mati og at brúka hesa vitan.

Matur og ráðlegging
Næmingurin dugir:

- at ráðleggja um og at gera fjølbroyttar, innbjóðandi og vælsmakkandi máltíðir
- at ráðleggja um arbeiðshátt og innkeyp, sjálvstøðugt og í bólki
- at nýta fakligar orðingar og hugtøk
- at velja matvørur, amboð, arbeiðshátt og røttu tilgerð í einari ávísari uppgávu og grundgeva fyri sínum vali
- at nýta fjøltáttaðar arbeiðshættir og fjøltáttaðar tilgerðir
- at meta um góðsku og dygd, nýtslu og framleiðslu
- at handfara matvørur, amboð og tekniskan útbúnað á hóskandi hátt.
- at meta um, hvat amboð og útbúnaður verður nýttur til, og vita, hvørjir vandar kunnu standast av teimum
- at velja hóskandi arbeiðsstøður og rørslur
- at hugsa um trygdina hjá tí einstaka og hjá bólkinum í øllum arbeiðsgongdum.

Matur og umhvørvi
Næmingurin skal duga:

- at meta um matvørur við atliti at tíðar- og orkunýtslu.
- at samanbera og meta um dygdina á heimagjørdum matvørum í mun til ídnaðarframleiddar matvørur.
- at gerast tilvitaður um hvussu miðlar, lýsingar og lýsingarherferðir ávirka okkara val.
- atl gerast tilvitaður um hvørja ávirkan valið av matvørum og nýtsluvørum hevur á heimliga og alheims umhvørvið.
- at meta um sambandið millum náttúrudálking og matvørudálking og hvørjar avleiðingar hetta kann hava fyri heilsuna.

Matur og brúkari
Næmingurin dugir:

- at gera fíggjarætlan í sambandi við innkeyp til húsarhaldið
- at meta um matvørudygd í mun til prís
- at vera tilvitaður um rættindi í samband við keyp.

Matur og reinføri
Næmingurin dugir:

- at skilja, at hansara egna gongd í køkinum og handfaring av matvørum hevur sera stóran týdning, tá ið um reinførið ræður.
- at geva dømi um hvar vit finna mikroverur, hvønn týdning tær hava og hvørji árin tær kunnu hava á umhvørvið, matvørur og menniskju.
- at fara um matvørur, so føðsluvirðið verður varðveitt.
- at hava í huga týdningin av persónligum reinføri í sambandi við matgerð.

MENTAMÁLARÁÐIÐ

	• at skilja týdningin av reinføri í samband við hagreiðing, matgerð, borðreiðing og at enda upprudding, og hvønn týdning hetta hevur fyri heilsu, lívsgóðsku og umhvørvið. • at nýta ymisk vaski- og reingerðingsevni. • at skilja hvat tey ymsu vaskisymbolini í klædnavørum merkja. • at goyma matvørur rætt t.d. at súlta, salta, sjóða, turka og frysta. • rætta nýtslu og viðlikahald av húsarhaldstólum og útbúnaði. Eftir hvørja undirvísingargongd verður eftirmett í hvønn mun settu málini eru nádd, og framyvir verður undirvísingin løgd til rættis, soleiðis at hvør einstakur næmingur í best møguligan mun røkkur førleikamálunum, tá ið hann er liðugur við 8.-9. flokk. Arbeiðshátturin er mest sum hin sami hvørja ferð: Vit gjøgnumganga eina uppskrift í felag, hvat tilfar og hvørji amboð skulu brúkast. Tey vaska hendur og finna fram alt tað, ið tey skulu brúka. Síðani fara tey í gongd at matgera við ráðgeving frá læraranum. Tá ið rætturin er liðugur, fara vit til borðs, og vit eftirmeta, tað ið tey hava gjørt og arbeiðsgongdina. Síðani vaska tey upp og rudda og vaska køkin, so alt er væl frágingið, tá ið tey eru liðug. Av og á verður okkurt læraraupplegg, sum er viðkomandi fyri holdið. **Tilfar** Ymsar uppskriftir úr føroyskum kókibókum ella av netinum, umskrivaðar og lagaðar til holdið.
4. flokkur	Frukt og grønmeti, matpakki og smárættir, kostráðini og reinføri
5. flokkur	Smárættir, millummáli, bakihættir, kostráðini og reinføri
5.-6. flokkur	Smárættir, millummáli, bakihættir og døgurði, kostráðini og reinføri
6. flokkur	Bakihættir, døgurði, kostráðini og reinføri

MENTAMÁLARÁÐIÐ

Ársætlan fyri lærugrein

Lærarin, sum undirvísir í lærugreinini, ger ársætlan, sum verður latin leiðslu skúlans fyri 15. sept.

Skúlaár	2019-2020
Skúli	Skúlin við Streymin
Floksheiti	
Flokssstig	6. fl
Lærugrein	Tónleikur
Lærari	Vanja Ejdesgaard

Ársætlan fyri lærugrein	Í 6. flokki verður undirvíst eftir ávegismálunum til 6. flokk: **6. flokkur** **Tónleikaíðkan** Næmingurin dugir: • at syngja eitt fjølbroytt úrval av føroyskum og útlendskum sangum - hóskandi er at duga 60 sangir • at luttaka í samanspæli við mikrofonsangi, klaveri, gittara, bassi, ljómborði, trummum/slagljóðførum o.ø. Næmingurin eigur at kunna fylgja pulsi og rytmu • at læra seg einføld løg við hjálp av nótum • at syngja unisont og einfalt fleirraddað við denti á intonatión, klang og úttrykk • einfalt melodispæl og einfalt harmoniskt/ rútmiskt undirspæl • at framføra nýggjari og eldri løg • saman við øðrum at venja og framføra egna tónleikaskrá • at niðurskriva tónleik, grafiskt ella við nótum • at spæla einføld løg frá blaðnum. **Tónleikaástøði** Næmingurin: • kennir mun á dur-skala og moll-skala umframt pentatona skalan

MENTAMÁLARÁÐIÐ

- dugir at greiða frá um fortekin og munin á dur og moll
- kennir grundintervallini
- lesir einfaldar nótamyndir
- kennir ljóðførini, sum eru at hoyra innan klassiskan tónleik
- kennir ljóðførini, sum eru at hoyra innan rytmiskan tónleik
- kennir nakrar grundleggjandi formar (ABA, AAB, ABC...)
- kennir rytmu, puls, form, lag, klang, dýnamikk, tempo og einfaldan harmonikk í lurting og spæli.

Tónleikafatan

Næmingurin:

- kennir aftur og dugir at greiða frá nøkrum stíl-/sjangrueyðkennum í ymiskum tónleiki
- kennir aftur tónleik, sum umboðar ymisk tíðarskeið
- dugir at greiða frá einum gjøgnumgingnum tónleikaverki
- kennir ljóð og nøvn á ymiskum ljóðførum
- veit eitt sindur um seriøsan tónleik og sølutónleik (kommersiellan tónleik).

Undirvísingarhættir og tilfar

Tilfar:

- Tónlæra 4
- www.musikipedia.dk
- Egna sangmappu
- Ljóðføri til samanspæl
- Youtube (sangir)

Í 6. flokki eru 2 tónleikatímar um vikuna. Næmingarnir læra sangir á føroyskum, donskum og enskum. Tónleikafatan og ástøði fyllir nú meir enn áður. Til tónleikaástøðið nýta vit bókina "Tónlæra 4" og netsíðuna "www.musikipedia.dk".

Í ár brúka vit nakað av tíð uppá samanspæl. Vit læra helst 2-3 sangir í árinum. Næmingarnir syngja og spæla tey ymisku instrumentini: trummur, bass, guitar, klaver og evt. elektriskan guitar.

Sangur og undirvísing fylgir ofta árstíðini. T.d: frá november syngja vit jólasangir og venja evt. til jólaframsýning. Fram til føstulávint venja vit kvæðir. Næmingarnir fáa

MENTAMÁLARÁÐIÐ

	hvørsína mappu, sum tey eiga sjálvi. Í hana koyra vit gjøgnum árið ymiskar sangir ið tey læra.

Yvirlit yvir undirvísingar-gongdir	
Heiti 1	Uml 60 fjølbroyttar sangir – føroyskar og útlendskar
Heiti 2	Samanspæl
Heiti 3	Tónleikaástøði
Heiti 4	Tónleikafatan
Heiti 5	